# Inntøkan er lækkað 20% seinastu seks árini

**Útróðrarmenn mótmæla harðliga ætlanini hjá landsstýrinum at inntøkutrygdin hjá teimum verður skerd**

INNTØKUTRYGD

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta visir, hvussu lágt, landsstýrið raðfestir okkum útróðrarmenn.

Tað er fyrsta viðmerkingin hjá formanninum í Meginfelag útróðrarmanna til nýggjasta útspælið frá landsstýrinum

Landsstýrið ætlar at broyta lógina um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn.

Men broytingarnar eru falnar útróðrarmonnum kring landið fyri brostið, tí teir siga, at broytingarnar eru til tað verra.

Auðunn Konráðsson, formaður í Meginfelag Útróðrarmanna, minnir á, at lógin um minstaforvinning er frá 1997.

Í løtuni fáa útróðrarmenn 8.200 krónur um mánaðin í minstaforvinningi.

– Men hetta er ein upphædd, sum er beinleiðis ásett í lógini. Sostatt er hon ongantíð dagførd hvørki eftir prístalinum, ella í aðrar mátar.

Hann sigur, at hesa tíðina er príslagið í samfelagnum hækkað eini 20%, so í veruleikanum er minstiforvinningurin lækkaður 20% hesi árini.



*Tað er undarligt, at landsstýrið skerjir inntøkumøguleikan hjá útróðrarmonnum, nú prísirnir eru nógv falnir, sigur Meginfelag Útróðrarmanna*

### Treytirnar harðna

Auðunn Konráðsson sigur, at samstundis er ætlanin at gera treytirnar verri fyri at fáa minstaforvinning.

Í løtuni er treytin fyri at fáa minstaforvinning í høvuðsheitum, at báturin hevur fiskað fyri 54.000 krónur upp á mannin teir seinastu seks mánaðirnar.

Og hava teir aðra inntøku afturat útróðrinum, verður tað mótroknað 50%.

Tað merkir, at hvørja ferð, ein útróðrarmaður forvinnur 1.000 aðrastaðni enn í útróðri, minkar minstiforvinningurin 500 krónur.

Auðunn Konráðsson sigur, at vinnur ætlanin hjá landsstýrinum frama, skal tað, sum ein útróðrarmaður forvinnur umframt útróðurin, nú mótroknast 65%.

Tað merkir, at hvørja ferð, ein útóðrarmaður forvinnur 1.000 krónur í aðrari vinnu, missur hann 650 krónur av minstaforvinninginum.

– Samstundis er ætlanin at hækka markið fyri, nær ein hevur rætt at fáa minstaforvinning upp í 75.000 krónur upp á mannin seinasta hálvárið.

Formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna sigur, at Meginfelagið tískil hevur mótmælt ætlanini hjá landsstýrinum.

– Hetta tykir mær undarligt, serliga nú prísirnir eru lækkaðir so nógv. Eitt nú fáa vit ikki meiri enn 2-3 krónur fyri kilo av hýsu, sum vit fáa mest av.

### Óverulig tøl

Auðun Konráðsson sigur er átalar eisini, at myndugleikarnir ikki vilja brúka sáttmálan hjá Meginfelag Útróðrarmanna sum grundarlag.

– Tá ið minstiforvinningurin verður roknaður út, verður gingið út frá, at manningin fær 42% av avreiðingarvirðinum.

Men nú hendir so eisini tann broytingin, at vísir avrokningin, at menninir fáa meiri enn 42%, skal tað talið brúkast.

– Men hetta er als ikki veruleikin, tí manningin fær ofta minni enn tað. Eitt nú kann báturin hava nógvar útreiððslur, men tær verða ikki tiknar við.

Hann sigur, at felagið fer eisini at biðja um fund við landsstýrismannin í fiskivinnumálum í eini roynd at gangafrá ætlanini.

Hann sigur, at tað er týðiligt, at ætlanin hjá landsstýrinum hevur als ikki til endamáls at tryggja útróðrarmonnum eina inntøku. Endamálið er at spara pening, sigur Auðunn Konráðsson.

Eisini Tvøroyrar Útróðrarfelag mótmælir ætlanini. teir siga, at serliga um veturin er lítið at fáa við snellu, so tað verða nógvir bátar, sum ikki koma upp á 75.000 krónur upp á mannin í avreiðingarvirðið í eitt hálvt ár og soatt fáa teir als ongan minstaforvinning.

# Farmaflutningurin hjá Strandferðsluni leggjast um

**Bjarni Djurholm sigur, at broytingar fara at henda, men enn er ov tíðliga at siga, hvat tær bera í sær. Hann leggur tó dent á, at ætlanin er ikki at skerja tænastuna til útjaðaran**

FARMAFLUTNINGUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er onki at ivast í, at Strandferðslan er lívæðrin hjá útjaðaranum í Føroyum. Ikki minst hevur farmaflutningurin hjá Strandferðsluni alstóran týdning fyri livikorini úti um landið. Serliga á smáplássunum er Strandferðslan munurin ímillum lív og deyð, tí hon tryggjar hvørjum smáplássi í landinum tær vørur, tey hava brúk fyri, bæði til landbúnað og aðra vinnu, og privat, og tað fyri ein sera lagaligan kostnað.

Tí er ikki at undrast á, at tað spekulatiónir hava tikið seg upp, nú tað frættist, at ætlanin er at leggja hesa tænastu um.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum váttar, at broytingar fara at henda.

Tò leggur hann afturat, at enn er málið komið so stutt, at tað er ómøguligt at siga, hvørjar broytingarnar verða.

Tí hevur málið heldur ikki verið til politiska viðgerð enn og tí verða heldur ongar broytingar her og nú.



*– Spurningurin er, um tað er yvirhøvur er ein uppgáva hjá Strandferðsluni at flyta farm runt um alt landið, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslu*

### Skal ikki skerjast

Men landsstýrismaðurin leggur eisini dent á, at ætlanin er ikki at skerja tænastuna, sum tey, ið búleikast úti um landið, fáa.

Tað hevur ljóðað, at ætlanin er at leggja farmaflutningin hjá Strandferðsluni undir Postverkið.

– Tað vita vit onki um enn, sigur Bjarni Djurholm. Hann sigur, at tað stendur í samgonguskjalinum, at tað skal kannast um tað ber til at samskipa farmaflutningin hjá Strandferðsluni og Postverkið.

– Ì tí sambandið hevur umsitingin í Vinnumálaráðnum, saman við Strandferðsluni og Postverkinum, kannað ymsar møguleikar.

– Men hetta er ikki so einfalt, sum tað ljóðar, tí Postverkið arbeiðir undir altjóða avtalum um, hvussu postflutningur skal fara fram.

– Skal farmaflutningurin hjá Strandferðsluni leggjast undir Postverkið, er tað tískil nakað, sum krevur drúgvar fyrireikingar.

Bjarni Djurholm sigur, at hinvegin eru aðrir møguleikar umhugsaðir í samráð við Strandferðsluni.

### Skal fyriskipa

Landsstýrismaðurin sigur, at hann hevur ætlað, at Strandferðslan verður ein samferðslueind, har stovnurin er fyriskipari og ikki operatørur.

– Fyrsta stigið varð at bjóða Bygdaleiðir út. Men vit mugu eisini seta spurnartekin við, um tað yvirhøvur er uppgávan hjá Strandferðsluni at flyta farm kring landið.

Bjarni Djurholm sigur, at tað er hesin spurningurin, sum er umrøddur m.a. í samráð við Postverkið.

Hann ásannar, at Strandferðslan hevur alstóran týdning í sambandi við flutning.

Men ætlanin er at fáa størri gjøgnumskygni og greiðari linjur fyri at sleppa undan teimum afturvendandi umsóknunum um eykajáttan.

– Men alt hetta má gerast í eini tilgongd sum er væl løgd til rættis fyri at sleppa undan óhepnum avleiðingum, sum ikki eru tilætlaðar, sigur Bjarni Djurholm.

Kortini vísir hann á, at um ikki so nógv ár er koyrandi ímillum 85% av føroyingunum og at tað eisini er ein spurningur um ikki onkur annar kann røkja farmaflutningin fyri Strandferðsluni, og samstundis veita eina tænastu, sum er minst líka góð, sigur Bjarni Djurholm.





*Jørgen Niclasen heldur, at tað eru ov nógvir leysir endar í bókini »Skjót journalistin«*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Nógvir leysir endar

**Eftir at hava lisið bókina »Skjót journalistin« heldur Jørgen Niclasen, løgtingsmaður, at har eru nógvir leysir endar, sum høvundarnir so bara gera til egin uppáhald, ið ikki altíð eru røtt**

VIÐMERKING

*Edvard Joensen*

Jørgen Niclasen heldur seg ikki hava fingið svar uppá, hvat endamálið við bókini »Skjót journalistin« er. Men uttan at kunna siga tað við vissu, heldur hann, at tað er at fáa egnar meiningar hjá høvundunum út millum fólk.

Ein av høvuðspersónunum, sum viðgjørdur verður í dagsins mest umrøddu bók, er fyrrverandi landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen.

Hann skilir ikki rættiliga endamálið við bókini, og heldur seg ikki hava fingið nóg greiðar upplýsingar um sín lut í henni heldur.

– Eg varð biðin um eina samrøðu av øðrum av høvundunum, og tí játtaði eg. Eg spurdi, hvat hon skuldi brúkast til, og fekk eitt ullint svar um, at hon skuldi kanska brúkast til eina blaðgrein ella kanska til eitt sjónvarpsinnslag, greiðir Jørgen Niclasen frá. Nú síggi eg, at hon hvørki varð ætlað til annað ella annað, men til hesa bókina.

Ikki tí, sigur hann. Tað, sum eg segði tá, er rætt endurgivið. Men annars dugi eg ikki at finna nakað av nýggjum í hasi bókini.

– Høvundarnir duga væl at lýsa løtumyndir við teirra egnu meiningum innbygdum, sigur Jørgen Niclasen heldur speiskur. Bæði tá Tórbjørn Jacobsen kemur eftir Tinghúsvegnum á Ólavsøku, tá Høgni Hoydal etur morgunmat heima í Hoyvík, og á tingfundinum, tá eg segði meg frá. Men annars er ikki nógv at siga um hatta.

Tó eru tvey ting, eg hefti meg við, sigur hann. Annað er á síðu 140, har høvundarnir siga, at.......soleiðis er journalistikkur ongantíð objektivur, men man má altíð gera eitt val.

Hitt er, at í yvirlitinum yvir skrivligar keldur standa bæði Høgni Hoydal og Tórbjørn Jacobsen. Men hóast stórur partur av bókini snýr seg um løgmann og hansara virki, er hann als ikki tikin við sum kelda, sigur Jørgen Niclasen.

Jørgen Niclasen er einki fegin um hesa bókina, skilst á honum. Hann metir hana sum eina útspillingarherferð, sum hann málber seg.

– Eg plagi annars ikki at lesa útspillingar. Men tá ein nú sjálvur er stórur partur av hesum, havi eg kent meg noyddan at skeita í bókina, sigur hann.

Jørgen Niclasen tekur upp aftur í saman, at hann heldur tað vera eina øgiliga trongd at havast at teimum, sum tora at seta journalistunum spurningar, sum hesir báðir hava lagt fyri dagin.




Vilt tú gerast teldunørdur?

- men orkar ikki at fara undir bert ástøðiliga útbúgving?
So hevur tú møguleikan nú at fáa eina meira verkliga telduútbúgving...
Vit bjóða tær fjølbroytta útbúgving, har tú hevur møguleika at arbeiða sum t.d. mennari (udvikler), sniðgevi (designer) ella KT-ráðgevi (systemkonsulent). Útbúgvingin skiftir millum skúla og starvsvenjing.
**NetStarv** er ein 16 mánaðar long útbúgving. Hugsanin er at nýta tøknina, soleiðis at luttakararar kunnu leggja orku í at verða kappingarførir á arbeiðsmarknaðinum.

**Áhugað kunnu venda sær á tlf. 350070 ella 211135.**
**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 9. desember 2003 kl. 16.00.**

www.alv.fo

**Málbólkur**
Serliga ætlað fólki, ið í størri ella minni mun eru førleikatarnað, sum hava eina miðnáms og/ella víðari útbúgving ella aðrar javnbjóðis royndir. Hóast brekið hava góð útlit til at røkja eitt arbeiði fulla tíð innan eitt nú KT-vinnuna.

**Endamál**
Málrættað útbúgving til óstuðlað arbeiði á ávísari fyritøku, t.d. sum mennari, formgevi ella KT-ráðgevi.

**Starvsvenjing**
Útbúgvingin er verklig. Umleið helvtin av tíðini er starvsvenjing á eini fyritøku.

**Innihald**
Eftir gjølla ástøðiliga læring, skulu luttakararnir gera seg serkønar á ávísum økjum, t.d. dátugrunnum, sniðgeving og interaktiviteti. Útbúgvingin skiftir millum undirvísing og starvsvenjing.